# Trívist væl í bakarínum

**Bakaríið á Sandi er gott arbeiðspláss, heldur Guðrun Dalsgaard, sum hevur arbeitt har í eina fjórðingsøld**

BAKARÍ
*Edvard Joensen*



*Guðrun Dalsgaard hevur starvast í góð 25 ár í bakarínum hjá Anfinni í Soylu, sum í skjótt 31 ár hevur glett gómarnar hjá sandoyingum við bakstri sínum*

**Heima á Sandi:** Í 25 ár hevur Guðrun Dalsgaard latið sandoyingum bakaravørur um diskin. Ikki tí, at hon er so ógvuliga gomul. Nei, men hon var bara 13 ár, tá hon byrjaði at standa í handlinum hjá grannanum, sum hevði bakarí.

Tað hevur dámt henni so mikið væl, at hon hevur hildið fram til denna dag og fer ivaleyst at gera tað eina tíð enn, sum vit skilja, tá vit støkka inn á gólvið í einasta bakarínum í oynni.

Tann fyrsta august í fjør vóru liðin 30 ár, síðan Anfinnur í Soylu lat upp bakarí á Sandi.

Hann arbeiddi frammanundan í bakarínum hjá Conradi Skaale í Havn, har hann eisini hevði lært.

Anfinnur greiðir frá, at hann øll hesi 30 árini hevur verið næstan einsamallur um at baka tað, sandoyingar hava etið av keyptum bakaravørum. Ein lærlig hevur hann havt hesi árini, sigur hann.

– Tað hevur verið spennandi, men øgiliga strævið. Soleiðis á leið tíggjunda hvørt ár havi eg havt feriu, sigur hann. Hann hevur havt tríggjar feriur, síðan hann lat bakaríið upp.

Tað hevur verið strævið í meira enn ein forstand, greiðir hann frá. Bæði tá nógv hevur verið at gjørt, men so sanniliga ikki minni, tá lítið hevur verið at baka.

– Sum nú tá kreppan var herfyri. Tá var mangan lítið at gera, tí eingin keypti slíkt, tey kundu gera sjálv, sigur bakarin á Sandi.

Fiskavirkini lótu aftur, og allar konurnar vórðu sendar til hús. So tað var eyðsæð, at rullukøkur og wienerbreyð var ikki tað fyrsta, fólk brúktu pengarnar til. Har varð alt, sum til bar, bakað heima.

Seinni er so vend komi íaftur, og nú koma fólk tíðari inn á gólvið hjá bakaranum.

Anfinnur í Soylu er bæði bakari og konditttari, so har fást bæði rugbreyð og moccakøkur, eins og sniglar og rundstykki.

– Soleiðis var læran, tá eg lærdi, greiðir hann frá. Bæði bakari og kondittari í einum. Og tað var einki við, at lærlingarnir fingu frí úr bakarínum at ganga í skúla. Nei, tað skuldi gerast um kvøldið, samstundis sum bakað varð um náttina og morgunin.

Framman fyri bakarínum er sølubúð, sum vanligt er hjá bakarum yvirhøvur. Sýnisgluggin er freistandi hjá honum, sum dámar ein góðan bita afturvið kaffinum. Men eisini hjá øðrum, sum hava aðrar ætlanir, veit bakarin at siga frá.

Innbrot hevur hann eisini havt, hesi árini, hann hevur havt bakaríið.

– Men tað var nú ikki eftir weinerbreyðum ella slíkum, sigur hann, uttan at stjala pengar.

Umframt Anfinn og Guðruna, er eisini ein onnur ekpeditrisa, sum skiftir við Guðruna.

– Og ikki minst er tað frúan, sum hevur hildið skil á øllum tølunum øll hesi árini, sigur Anfinnur í Soylu, bakari á Sandi, sum bara nikkar, tá spurt verður, um hann hevur hug at halda fram nøkur ár enn.

# Úr Skopun til Aberdeen og aftur

**Grótið, sum skal prýða nýggja tinghúsið, verður høgt í Skopun og flutt til Skotlands at viðgera, áðtrenn tað kemur aftur at verða lagt á tingtrappurnar**

GRÓTÍDNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Skopun:** Føroyska tinghúsið skal partvís klæðast við gróti. Føroyskum sjálvandi. Men tað má gerast klárt í Skotlandi, tí einki hóskandi virki er í Føroyum til endamálið.

Í høvdahaga í Skopun høgga teir stórar blokkar av góti. Teir verða fluttir við lastbilum Heim á Sand, har farmaskipið hjá Skipafelagnum er eftir teimum og flytir teir til Aberdeen.

Í Aberdeen verða blokkarnir sagaðir og poleraðir og viðgjørdir annars, áðrenn teir koma aftur til Føroya.

Afturkomnirtil Føroya skulu teir viðgjørdu steinarnir setast upp móti grundini á nýggja millumbygninginum millum gamla tinghúsið og telefonverkshúsið. Eisini skal nakað brúkast til trappur hjá tingmonnum og øðrum góðum fólki at ganga á.

Í Aberdeen verður grotið viðgjørt á sama virki, sum eisini ger nýggja skotska tinghúsið. Men grótið, sum har verður brúkt, er tikið úr heimligum umhvørvi í Skotlandi.

Óli Nielsen, gróthøggari í Havn, hevur staðið fyri tí praktiska við at loysa blokkarnar í Skopun og fáa teir av landinum. Tilsamans eru eini 150 tons av gróti farin til Skotlands, sigur hann.

Grundin til, at grótið verður tikið úr Skopun, er tann, sigur Óli Nielsen, at har kemur tann einasta føroyska lindin, sum hevur egnað grót til so stórar blokkar, sum brúk er fyri, undan.

Hendan lindin liggur ovarlaga í Mykinesi, í Høvdahaga í Skopun, og í Suðurstreymoy við Argjahøvda og á Boðanesi.

Fyrr varð grót sprongt úr grótbrotinum á Boðanesi, men tað er nú friðað. Tí verður slíkt grót tikið úr Høvdahaga ístaðin.

Tað hevði ivaleyst verið bíligari at klætt tinghúsið við útlendskum gróti, heldur Óli Nielsen, uttan tó at vilja siga nakað sum helst um, hvat hetta kostar.

– Men tað ber nú ikki so væl til at fara klæða føroyska tinghúsið við útlendskum gróti. Tað má vera føroyskt.



*Skopun letur grót til tinghúsið. Men tað skal ein túr til Aberdeen fyrst, áðrenn tað sleppur til Havnar*

*Mynd: Edvard Joensen*







Demens merkir at fara úr sinni. Tú gerst óhjálpin og veitst at enda ikki, hvør tú ert. Tíni næstu noyðast at taka ræðið og ábyrgdina. Tað er mannminkandi, óvirðiligt og tyngjandi. Tí verður demens ofta nevnd »sjúka teirra avvarðandi«.

Roknað verður við, at 300 føroyingar eru illa sjúkir av demens. Sostatt eru nógv ið hava stóran trupulleika at ansa teimum, tey liva saman við og eru góð við.

Tey avvarðandi kenna seg slept upp á fjall. Tey eru gloymd, hóast tíðirnar eru góðar. Samfelagið stendur í blóma, bygningar, tunlar og stór skip verða aftur bygd, men lítið er gjørt fyri at bøta um korini hjá teimum gomlu og minnisveiku.

Hagtølini siga, at fimti hvør okkara yvir 65 ár fær demens. Og tá ið tey gomlu gerast ein alsamt størri partur av samfelagnum, verður trupulleikin samsvarandi størri og truplari. Tørvurin á røktarheimsplássum er eyðsýndur.

ALZHEIMER felagið

Demenslinjan tel. 31 31 02 er opin hvønn týsdag kl. 18 til 20.

www.alzheimer.fo